## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Andøvsgul upp í ein strúk av eystri, skýggjað, men møguliga regn fyrrapartin. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av eystri og landsynningi og stundum regn ella mjørki. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið mánadagin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum og stundum regn ella mjørki. Hitin millum 11 og 14 stig.

**Veðrið týsdagin og mikudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi, seinni av ymsum ættum. Stundum regn ella ælingur og hitin millum 10 og 12 stig.

# Tann fyrsta siglingstíðin

*Jústinus Leivsson*
*Eidesgaard*



*Børnini stuttleika sær ófört á Lítla Fløtti við Gjógv.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Summarið hevur verið heldur kargt við lýggjum døgum, men sólin sær av og á kring landið, og løtan, hendan myndin er tikin, er fullgott prógv um, at góða gamla sólin kveikir lív í ung og gomul.

Myndin er tikin seinasta sunnudag av einum kvívíkingi giftir við gjáarkonu og hon er av kenda hylinum Lítla Fløtti við Gjógv. Vanliga síggja vit henda hyl avmyndaðan við Kallsoynni, Kallinum og Borgaranum í baksýni og tá er myndin landskend. Men við myndatólinum snúraðum eina helvt hinvegin, fær tú rættuliga fatan av hvussu stóran trivna, hesin hylur enn kann geva stórum og smáum børnum.

Í hylinum hava siglandi gjáarmenn tikið fyrstu siglingartíðina og varð hon roknað við, so hevði hon munan. Fyrr var tað helst bara við kíkum og flakum, men seinnu tíðina eru oljutunnurnar væl umtóknar.

Og vita tit hvussu leingi tað tekur at gera ein slíkan tunnubát. Tað tekur í hvussu er ein heilan dag hjá einum smádreingi við meitli og stórum hamara. Tunnubátarnir eru tryggir, leggur tú tveir hálvar brennivínskassar undir miðjuna, men ikki tryggari enn so, at mangan karmin geva teir eisini.

Nú er Gjógv ikki kyrrupláss og stremur er uttanfyri, men á Oyndarfirði sigldu vit onkuntíð við tunnubáti langt út á sandgrynnuna heilt út til dekksbátarnar ,sum lógu við teym, og sætt í bakspeglinum var tað meria hepni enn skil, sum stýrdi verkinum. Børn í dag eiga als ikki at eftirapa tí ørskapinum.

At gera tunnubát er stuttligt og spennandi. Spenningurin er stórur, meðan tunnan verður klovin, og so fáa smádreingirnir frið ein ella tveir dagar, har teir sigla, demma og buka vátar hosur alt í einum. Men upp á eitt ella annað tíðspunkt, tað er ilt at siga akkurát nær tað hendir, so kemur ótti á tey vaksnu og tunnubátarnir og ævintýrið verður forkomið. Men dreymurin um at hava egin far undir fótum sløknar ikki og smádreingirnir manna seg aftur eina tíð seinni og fara at klúgva tunnur.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 9 |
| Nuuk | 5 |
| Qaqortoq | 11 |
| Ammassalik | 8 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 12 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 11 |
| Aberdeen | 12 |
| London | 16 |
| Tromsø | 12 |
| Bergen | 19 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 17 |
| Keypmannah. | 20 |
| Helsinki | 21 |
| Moskva | 30 |
| Berlin | 24 |
| Warzawa | 24 |
| Kiev | 29 |
| Bukarest | 31 |
| Paris | 16 |
| Madrid | 19 |
| Róm | 27 |
| Malorca | 19 |
| Athen | 32 |
| Malta | 31 |
| Tunis | 37 |
| Beijing | 30 |
| New Dehli | 30 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | -- |
| Sydney | 16 |
| New York | 22 |
| Miami | 29 |
| Los Angeles | 21 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | -- |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 12 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 996 hPa. á 56N-26V fer móti Skotlandi. Hátrýstið norðan fyri Ísland viknar.




Lágtrýstið vestan fyri Skotland fer spakuliga í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum um vikuskifti.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 19/07 kl. 06⁰⁰– 20/07 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 9,2°
Minsti hiti máldur í juli 0,4° Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 19/07 kl. 06⁰⁰– 20/07 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í juli: 27,9 mm

### VESTFALLSKYRRINDI

21. juli: Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 21. juli | 07.48 | 20.17 | 06.48 | 19.17 | 07.03 | 19.32 | 09.48 | 22.17 | 10.48 | 23.17 | 06.03 | 18.32 | 05.03 | 17.32 | 08.03 | 20.32 | 09.03 | 21.32 | 07.33 | 20.02 | 08.48 | 21.17 |
| 22. juli | 08.47 | 21.18 | 07.47 | 20.18 | 08.02 | 20.33 | 10.47 | 23.18 | 11.47 | — | 07.02 | 19.33 | 06.02 | 18.33 | 09.02 | 21.33 | 10.02 | 22.33 | 08.32 | 21.03 | 09.47 | 22.18 |
| 23. juli | 09.45 | 22.12 | 08.45 | 21.12 | 09.00 | 21.27 | 11.45 | — | 00.18 | 12.45 | 08.00 | 20.27 | 07.00 | 19.27 | 10.00 | 22.27 | 11.00 | 23.27 | 09.30 | 21.57 | 10.45 | 23.12 |
| 24. juli | 10.37 | 23.02 | 09.37 | 22.02 | 09.52 | 22.17 | 00.12 | 12.37 | 01.12 | 13.37 | 08.52 | 21.17 | 07.52 | 20.17 | 10.52 | 23.17 | 11.52 | — | 10.22 | 22.47 | 11.37 | — |
| 25. juli | 11.26 | 23.51 | 10.26 | 22.51 | 10.41 | 23.06 | 01.02 | 13.26 | 02.02 | 14.26 | 09.41 | 22.06 | 08.41 | 21.06 | 11.41 | — | 00.17 | 12.41 | 11.11 | 23.36 | 00.02 | 12.26 |

Brúðarlín
v/ Anniku Gaard
Jugralið 22
Tlf./Fax. 314281
Brúðar- og brúðargentukjólar við tilhoyri til leigu
Nýggir kjólar kunnu útvegast

Antennu-monteringar
Vit avgreiða allar antennu-monteringar
- Komplettar nýmonteringar
- Útskifting og umvæling
- Felags antennuanlegg
Fokus ELEKTRONIK
J. Broncksgøtu 34
Tlf. 311306 - Fax 311306

Sera bíligt at LEIGA SJÓNVARP
Úr 240,- og niðureftir
EINKI DEPOSITUM
Allar std. 20-26"
Vit hava eisini video
RADIO VERKSTAÐIÐ
V/ Guttorm Mortensen
Mannbrekka 1
Tlf. 319544

JUNIOR
BUSS TAXA KOYRING
pláss til 10 ferðandi
Tlf. 22 33 11
Eyðbjartur Danielsen
Pætursgøta 14 • FO-100 Hoyvík • Tórshavn

Spf.
…hvør sigur at vit eru sum onnur?
Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 31 45 55
fax 31 80 26
hestoy@hestprent.fo
HESTPRENT